

*Summi skip fáa upp í eftir 10 døgum, meðan onnur á somu veiði draga svart. Jaspis og Ametyst, sum plaga at fiska væl, tordu nógv illa til lands hendan túrin, so vánalig sum veiðan hevur verið á túrinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

aðinum



*Væntandi koma línuskipini, Vesturhavið og Kambur, inn at landa fríggjadagin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Tað kann gerast ógvuliga trupult hjá Føroyum at varðveita toskarættindini í russiska partinum av Barentshavinum, nú alt bendir á, at TAC'ið á svartkjafti verður tað minsta nakrantíð*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Keypa tosk við makreli

**SAMRÁÐINGAR Í hesum døgum eru samráðingar í London um svartkjaft. Trupulleikin er ikki, at londini eru ósamd, men at TAC'ið helst verður ógvuliga lágt. Tað er tí ikki væntandi, at Føroyar fáa nóg mikið av svartkjafti til keyp av toski í Barentshavinum**

Vilmund Jacobsen

Fiskifrøðin sigur, at svartkjaftastovnurin er sera illa fyri, og nú samráðingar eru í London í dag um heildarkvotu og býtið av svartkjaftinum, er væntandi, at vit fara at síggja minstu heildarkvotu av svartkjafti nakrantíð.

Londini, sum eru strandalond og samstarva um svartkjaftin um okkara leiðir, eru Føroyar, Ísland, Noreg og ES.

Í ár er heildarkvotan av svartkjafti millum 500 og 600.000 tons, harav Føroyar eiga síni 26%. Av eini kvotu upp á umleið 120.000 tons, sum er føroyski parturin í ár, lata vit russum eini 85.000 tons aftur fyri tosk úr Barentshavinum.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur, at tilmælini hjá fiskifrøðini um svartkjaftin hava verið órógvandi.

- Alt bendir á, at heildarkvotan í ár hevur verið alt ov stór í mun til støðuna, sum svartkjafturin er í, og ymisku tilráðingarnar hjá ICES hava næstan sveiggjað við pluss/ minus 40%. Tí er eisini eitt sindur ilt at meta um, hvat úrslitið verður í samráðingunum millum strandalondini í London í dag.

Jacob Vestergaard heldur tó ikki, at stórvegis ósemja er millum londini um svartkjaftin.

- Í ringasta føri kann henda, at strandalondini semjast um eina heildarkvotu upp á 40.000 tons fyri 2011. Um so verður, er greitt, at Føroyar fara at hava lítið at lata øðrum.

## Makrelur í býti

Landsstýrismaðurin vísir á, at í sínámillum fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Rusland, fáa Føroyar tosk í Barentshavinum aftur fyri svartkjaft og makrel.

- Samráðingar við russar verða helst í endanum av hesum árinum, og tá hevði verið heppið fyri okkum, um vit áttu ein størri lut í býtinum av makrelinum.

Jacob Vestergaard heldur, at makrelurin kann gerast okkara besta alternativ til svartkjaftin í eini nýggjari sínámillum fiskiveiðiavtalu við russar.

- Men í løtuni vita ikki, hvussu verður við býtinum av heildarkvotuni av makreli, ei heldur, hvussu stórt TAC'ið á svartkjafti verður fyri komandi ár.

Landsstýrismaðurin ásannar, at hetta er ein trupul støða, men hann vónar, at trupulleikarnir, sum liggja fyri framman í royndini at varðveita toskin í russiska partinum av Barentshavinum, fara at loysa seg á onkran hátt.